## Arnold Joensen til LÍF

Klaksvíkingurin, Arnold Joensen, hevur skrivað undir sáttmála við 1. deildar felagið LÍF fyri komandi kappingarár. Tað skrivar almenna heimasíðan hjá leirvíksliðnum. Arnold Joensen er 32 ára gamal. Hann er uppvaksin í Klaksvík og hevur spælt nógv av sínum vaksna fótbóltslívið í KÍ. Seinastu árini hevur hann tó eisini roynt seg í bæði B68 og ÍF, og nú skal hann so royna seg í LÍF. Hetta er fyrsti leikarin, LÍF hevur gjørt sáttmála við síðani kappingarárið í fjør endaði. Heimasíðan hjá LÍF skrivar, at felagið fegnast um sáttmálan og roknar við, at Arnold verður ein styrkur fyri liðið.

## Beckham til USA

Real Madrid hevur í eina tíð roynt at fingið ensku fótbóltsstjørnua, David Beckham, at longt um sáttmálan, sum gongur út í summar. Nú hevur enska stjørnan tó gjørt av, hvar hann fer at halda fram á síni fótbóltsleið. Í gjár skrivaði hann undir 5 ára sáttmála við amerikanska felagið LA Galaxy, og eftir øllum at døma gevur sáttmálin David Beckham á leið 250 mió $. Umframt góðu evnini hjá David Beckham á einum fótbóltsvølli, so er hann helst eisini sterkasta merkisvøra innan fótbóltsheimin, og einki er at ivast í, at amerikumenn eisini síggja eina góða marknaðarføring í hesum keypinum.



# Mølvig aftur til Klaksvíkar

**Sum skilst, ætlar Klaksvíkar Róðrarfelag at fáa Stephan Mølvig aftur til felagið at røkja somu uppgávur, sum hann hevði í 2005, tá hann var her seinast**

KAPPRÓÐUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*



Í 2005 hevði Klaksvíkar Róðrarfelag ein sera stóran profil innan rógving í felagnum. Tá fingu teir nevniliga danska olympiska gullvinnaran í rógving, Stephan Mølvig, til felagið, har hann virkaði sum ráðgevi hjá øllum bátunum, samstundis sum hann róði við Nevinum Reyða, sum vann allar róðrarnar hetta árið.

Avtalan hjá Stephan Mølvig við KRF var bert fyri kappróðrarárið 2005, so hann vendi ikki aftur til Klaksvíkar í 2006. Hetta árið fingu kappróðrarbátarnir í Klaksvík aftur góð úrslit, og millum annað vann flaggskipið, Klaksvíkingur, meistaraheitið í 10-mannaførum.

Nú ljóðar, at KRF ætlar at fáa Stephan Mølvig aftur til Klaksvíkar. Ætlanin er, at hann skal røkja somu uppgávur, sum hann hevði, seinast hann var í Føroyum, men í staðin fyri at rógva við Nevinum Reyða ætla klaksvíkingar, at hann skal vera við at manna Klaksvíking, sum ætlar at endurvinna meistaraheitið. Enn er eingin ítøkilig avtala komin á pláss millum Mølvig og KRF, men formaðurin í KRF, Jóhan Petur Jacobsen sigur, at um alt gongst eftir ætlan, so verður Mølvig aftur í KRF í ár.

- Ja, vit tosa við Stephan um at koma aftur, og hann er áhugaður. Enn er einki endaligt komið uppá pláss, men um tað gongst eftir ætlan, so verður Stephan Mølvig partur av manningini hjá Klaksvíkingi komandi kappingarár.

### Toppskjúttar í Atlantic Airways deildini:

| | | |
|---|---|---|
| Finnur Hansson | StÍF | 103 |
| Damir Oros | KÍF | 91 |
| Blagoje Buha | Neistin | 77 |
| Rókur Akralíð | Kyndil | 68 |
| Esbern Patursson | H71 | 68 |
| Hans Áki Dal Christiansen | Kyndil | 67 |
| Tróndur Kragesten | Neistin | 61 |
| Sámal Joensen | VÍF | 59 |
| Niels Viggo Niclassen | H71 | 56 |
| Daniel Rapa | KÍF | 53 |

### Toppskjúttar í Sunset kappingini:

| | | |
|---|---|---|
| Nicoleta Radu Hansen | Neistin | 91 |
| Daiva Tuomaite | VB | 86 |
| Lina Andriulyte | Kyndil | 63 |
| Ninna K. Johansen | StÍF | 50 |
| Alina Olaru | Stjørnan | 49 |
| Rebekka Justinussen | StÍF | 48 |
| Durita Christophersen | Stjørnan | 38 |
| Simona Petersen | Stjørnan | 37 |
| Anja Heinadóttir | Kyndil | 37 |
| Ása Dam á Neystabø | Neistin | 36 |

# Kúlurnar rulla aftur




BILLARD
*Tíðindaskriv*

Leygardagin verður sett hol á føroyameistarakappingina í billard fyri lið. Í mun til undanfarna kappingarár eru ymsar broytingar gjørdar. Heldur laka undirtøkan ger, at tað hevur verið neyðugt at minka um luttakaratalið á hvørjum liði. Fyrr vóru tríggir á liðnum, nú verða tað tveir. Í ár verður so eisini bara spælt í eini deild. Fyrr vóru tríggjar deildir.

Feløgini, sum luttaka, eru: Havnar Klubbi, Kaggin og Klaksvíkar Billardfelag. HK og KB hava hvør síni tvey lið og Kaggin eitt.

Kappingin fer fram á tann hátt, at hvør spælari dystast tvær ferðir móti spælarunum á mótstøðuliðnum.

Fyrstu dystirnir verða í vikuskiftinum. Tá spæla bæði klaksvíkarliðini móti hvørjum øðrum og sama gera liðini hjá Havnar Klubba. Kappingin endar 10. mars. Einstaklingakappingin verður í Klaksvíkar Klubba í mars.

**Hondbóltsstøður**

**Sunset-kappingin**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 223 | 182 | 41 | 8 |
| 2 Neistin | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 238 | 188 | 50 | 7 |
| 3 VB | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 214 | 226 | -12 | 6 |
| 4 Kyndil | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 214 | 249 | -35 | 2 |
| 5 StÍF | 0 | 0 | - | 0 | - | 0 | 178 | 222 | -44 | 2 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 332 | 293 | 39 | 11 |
| 2 StÍF | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 300 | 295 | 5 | 7 |
| 3 Neistin | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 347 | 328 | 19 | 6 |
| 4 KÍF | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 292 | 310 | -18 | 5 |
| 5 H71 | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 299 | 343 | -44 | 5 |
| 6 Kyndil | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 301 | 302 | -1 | 4 |

**Flogbóltsstøður**

**Meistaradeild kvinnur**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ÍF | 12 | 9 | - | 3 | 31 | 21 | 10 | 11 |
| 2 TB | 12 | 8 | - | 4 | 28 | 14 | 14 | 10 |
| 3 Dráttur | 12 | 8 | - | 4 | 29 | 22 | 7 | 9 |
| 4 SÍ | 12 | 7 | - | 5 | 26 | 22 | 4 | 8 |
| 5 KÍF | 12 | 2 | - | 10 | 19 | 30 | -11 | 2 |
| 6 Mjølnir | 12 | 2 | - | 10 | 9 | 33 | -24 | 2 |

**Meistaradeild menn**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Mjølnir | 10 | 8 | - | 2 | 27 | 13 | 14 | 10 |
| 2 ÍF | 9 | 8 | - | 1 | 24 | 12 | 12 | 9 |
| 3 Fram | 10 | 5 | - | 5 | 19 | 21 | -2 | 6 |
| 4 Fleyr | 10 | 3 | - | 7 | 15 | 23 | -8 | 4 |
| 5 SÍ | 11 | 1 | - | 10 | 16 | 32 | -16 | 1 |